sítt grannalag og vil varðveita tað fyri børnini hjá sær, men eisini fyri seg sjálvan, tí tað er heimligt at kenna aftur teir runnar, trø, áir, klettar, blómur grasfløtur, fjøll og heyggjar, sum mynda grannalagið; tað er kenslan av staðkenning, tað at kenna seg aftur í tí ein er umgyrdur av, ið fær ein at kenna seg heima og siga við seg sjálvan: hetta er mítt grannalag, her er mítt heim).

**Heilag jørð**

Norðuramerikanskir indianarar søgdu fyri nøkrum árum síðan við Gary Snyder, sum tá var formaður í jarðarráðnum við vesturstrondina í USA, at teir høvdu nakra heilaga jørð, sum stjórnin ætlaði at oyðileggja. Snyder segði stjórnini frá hesum, og hon spyr so hvørja landanýtslu kategori “heilag jørð” hoyrir undir. Tað verður skemtað eitt sindur aftur og fram við hesum, men so rennur Snyder í hug, at kring allan knøttin er heilag jørð sum t.d. kirkjujørð, gravstaðir, støð og øki til gudadýrkan og tilbiðjan. Eisini nevnir Snyder nationalparkirnar í USA (t.d. Yellowstone park og Grand Canyon) sum landøki, ið eru friða og vera vird og sæð sum halgir staðir. Vit hava ikki altíð tørv á, ella rættari, tað er ikki altíð neyðugt við eini rationella og skilagóða frágreiðing og grundgeving fyri at varðveita eitt landøki; kanska vit bara (kundi) kenna okkum eitt sindur betur við ikki at oyðileggja eitt øki, sum onkur ynskir at friða. Tað gevur eisini komandi ættarligum høvi at síggja og uppliva hetta friðaða økið.

Gary Snyder tosar eitt sindur um senbuddhatrúgv (Snyder gjørdist senbuddhistiskur munkur, ta tíðina hann búði í Japan), har hann sigur eina venjing vera at sita stillur (zazen) og meditera í ein hálvan tíma, sum hann ger hvønn dag. Í tí hálva tímanum tú situr, skal tú ikki hugsa um arbeiði ella nakrar aðrar skyldur, tí tað eru átrokandi og kanska eisini streingjandi (stressandi) tankar og áminningar, sum órógva sinnið. Við at hugsa um einki, ella at hugsa um himmalhválvið og náttúruna, sum jú bara er har og passar seg sjálv, lættist sinnið, og tú vil kenna nøgdsemi og gleði við tað sum er, hóast tey syndarligu og óhepnu elementini í tilveruni.

# Føroyingum tørva vistfrøðiligt tilvit

**-Føroyingar hava onga umhvørvisverndar siðvenju. Tað er sjálvandi ikki so løgið vegna áðurnevndu landafrøðiligu støðu okkara, men hóast tað er tíðin komin til at luttaka í tí heimsfevnandi orðaskiftinum um umhvørvið. Okkum tørvar vistfrøðiligt tilvit, sum einfalt er at hugsa seg um, áðrenn ein tveitur okkurt burtur, og hugsa um reinføri uttandura so væl sum innandura**

UMHVØRVISVERND
*Dávid Isfeld*

**Eftirmæli**

Ein situr nú møguliga við spurningunum: Hvat ger ein samrøða við ein amerikanskan yrkjara um skógir, friðing o.a. í føroyskum fjølmiðlum? Hvønn týdning hevur samrøðan fyri okkum? Hetta skal seta gongd í eitt orðaskifti, sum so vónandi kann gerast ein partur av tilvitinum (bevíðstheitini) hjá tí einstaka føroyinginum. Eftir greinina í Sosialinum 11. januar um sjáldsamar plantur í Føroyum, ið eru um at doyggja út, er tíð til at síggja týdningin av einum slíkum orðaskifti, sum sjálvandi skal bakkast upp við tiltøkum.

Føroyar eru avbyrgdar frá umheiminum av havinum, harafturat er sera lítið til av ídanaðarvirkjum her í norðuratlantshavinum, og hevur hetta hjálpt til at dálking av okkara umhvørvi er komin seint. Men hon er komin. Eitt tað fyrsta vit hoyrdu um dálking, ið raktið okkum beinleiðis, var um høga kviksilvur innihaldið í sjófita; serstakliga í spikinum á grind. Eg vil ikki koma inn á nágreiniliga viðgerð av spuningum um dálking, men meira nerta við (sum Snyder ger í sínum yrkingum og í oman fyri standandi samrøðu) tað vistfrøðiliga tilvitið.

Føroyingar hava onga umhvørvisverndar siðvenju. Tað er sjálvandi ikki so løgið vegna áðurnevndu landafrøðiligu støðu okkara, men hóast tað er tíðin komin til at luttaka í tí heimsfevnandi orðaskiftinum um umhvørvið. Sum Gary Snyder ofta hevur víst á, snýr tað seg ikki um at bjarga einum skógi, hvali o.s.fr., men tað snýr seg um at fáa eitt tilvit í gerandisdegnum sum umfatar eitt vistfrøðiligt tilvit so væl sum aðrar politiskar rættleikar sum t.d. javnstøða millum mann og kvinnu. Hvat er so eitt vistfrøðiligt tilvit? Jú, tað er einfalt at hugsa seg um áðrenn ein tveitur okkurt burtur, og hugsa um reinføri uttandura so væl sum innandura. Ein skal ikki at tveita burtur nakað, ið kann nýtast; gev tað burtur, um tú ikki fær selt tað. Keyp vistfrøðiliga vøru - hon kostar ikki so nógv, at hon órógvar títt livistøði; gang ístaðin fyri altíð at koyra - tað er betur fyri náttúruna og teg sjálvan, o.s.fr., hetta eru smá ískoyti fyri tann einstaka, men ger stóran mun, um øll gera sítt. Vit liva í eini tíð, har okkara tilvit er á tremur við tonkum um eitt lættari, ómaksleysari - og avlíkavæl (og framíhjá) marglætisríkari - lív, har lítið og einki pláss er fyri hógv, skynsemi og fyrilit fyri okkara náttúru. Hetta skal skiljast sum eina veking upp úr okkara marglætisdvala, har eingin tykist nøgdur, men altíð skal hava meira; kosta náttúruni hvat henni kosta skal.

PS. Hvussu hevði tað verið, at friða eitt hagaøki í Føroyum?




*Føroyar eru avbyrgdar frá umheiminum av havinum, harafturat er sera lítið til av ídanaðarvirkjum her í norðuratlantshavinum, og hevur hetta hjálpt til at dálking av okkara umhvørvi er komin seint. Men hon er komin. Eitt tað fyrsta vit hoyrdu um dálking, ið raktið okkum beinleiðis, var um høga kviksilvur innihaldið í sjófita; serstakliga í spikinum á grind*



Hvørjir runnar og blómur - kanska eisini trø - høvdu ikki komið til sjóndar, sum vit ongantíð hava lagt til merkis áður? Eitt nýtt vistfrøðiligt umhvørvi og búøki fyri djór. So kundu føroyingar, eins og útlendingar (ferðafólk), sæð hvussu Føroyar sóu út fyri góðum 1000 árum síðan.

*Hvussu hevði tað verið, at friða eitt hagaøki í Føroyum? Hvørjir runnar og blómur - kanska eisini trø - høvdu ikki komið til sjóndar, sum vit ongantíð hava lagt til merkis áður? Eitt nýtt vistfrøðiligt umhvørvi og búøki fyri djór. So kundu føroyingar, eins og útlendingar (ferðafólk), sæð hvussu Føroyar sóu út fyri góðum 1000 árum síðan. Havnadalur kann helst vera góð fyrimynd í so máta*